# Vælkomin

**Handbók til starvsfólk á Hotel Hafnia**

Dagfesting: 27.04.23





## Vælkomin

Vit eru glað fyri at hava teg í starvi, og vit vóna, at tú fert at trívast væl hjá okkum.

Vit vilja fegin hjálpa tær so væl vit kunnu, so tú kanst fyrireika teg á besta hátt til tín fyrsta starvsdag hjá okkum. Hendan handbókin gevur tær upplýsingar um ymisk starvsfólkaviðurskifti, og hvussu vit arbeiða á hotellinum. Gev tær stundir til at seta teg inn í tað, sum stendur í handbókini, og nýt hana annars sum uppslagsverk í gerandisdegnum.

***Enn einaferð vælkomin á Hotel Hafnia og góðan arbeiðshug!***

# Hotel Hafnia

Í 1950 tók Christian Dal Restorff stig til at byggja eitt nýtt hotell í Tórshavn, nevniliga Hotel Hafnia. Maður kemur í mans stað, og í 1988 tóku Johan og Martin Christian (MC) yvir. Ein góð tænasta var altíð teirra hjartamál. Á vetri 2005 skifti hotellið eigara, og vóru tað Osmund Justinussen saman við synunum Tummasi og Gunnari og norðmanninumn Per Sævik, ið tóku yvir. Tó við somu starvsfólkunum og sama hjartamáli.

Í januar 2018 varð Hotel Hafnia yvirtikið av Smyril Line samtakinum. Smyril Line er ein stór fyritøka í føroyskum høpi; virksemið fevnir um ferðafólkaflutning, farmaflutning og hotel- og matstovuvirksemi.

Vit eru í dag eitt altjóða hotell við 5 fundarhølum, 78 kømurum, 4 smáttum, tveimum matstovum og kafé.

**Restaurant Hafnia** er kend fyri sínar vælvitjaðu morgunmatar- og frokostbuffetir. Harafturat fyri sína leskiligu fiskabuffet, ið verður borðreidd hvørt summar í juli og august.

**Katrina Christiansen** er ein sjarmerandi og søguliga matstova 70 metrar frá Hotel Hafnia. Her borðreiða vit tapas-rættir við íblástri úr føroyskum matsiði og øllum tí, sum náttúran hjá okkum hevur at bjóða.

**Kafé Kaspar** er okkara hugnaliga kafé, ið borðreiðir lættar rættir, leskiligar køkur og vælsmakkandi kaffi.

Les meira um, hvat vit bjóða á okkara ymisku matstovum á www.kaspar.fo, www.hafnia.fo, www.katrina.fo.

**Fundarvirksemi:** Vit kunnu leggja afturat, at í 2018 fingu vit okkara fjórðu stjørnu frá Horesta fyri okkara fundahentleikastøði, sum vit eru sera errin um.

Hotel Hafnia rekur harumframt Hotel Brandan.



# Innihald


Okkara starvsfólkapolitikkur ... 6

**Tá vit møta til arbeiðis** ... 6

**Sosialir miðlar og umdømið hjá hotellum okkara** ... 7

**Sjúkuleiðreglar** ... 8

**Vaktarskipan og umbýting av vakt** ... 8

Setanarviðurskifti ... 9

**Áðrenn tú byrjar í starvi hjá okkum** ... 9

**Búnar** ... 9

**Tænarar:** ... 9

**Kokkar:** ... 10

**Gongsfólk:** ... 10

**Prísir á búna við avsláttri:** ... 10

**Trygging** ... 11

**Planday** ... 11

**Matarsteðgur** ... 11

**Feria** ... 12

**Feria við løn, fastlønt** ... 12

**Feria uttan løn, tímalønt** ... 12

**Heima hjá sjúkum barni** ... 12

**Barnsburðarfarloyvi** ... 12

**Tá tú fert úr starvi** ... 12

**Uppsøgn** ... 13

Innanhýsis politikkur ... 13

**Merkisdagar** ... 13

**Starvsfólkaavsláttur og STAFF CARD** ... 13

**Teldur/Alnót** ... 14

**Gloymdir lutir** ... 14

**Privatar fartelefonir** ... 14

**Royking og rúsevni** ... 14

**Happing** ... 14

**Tagnarskylda** ... 14

Trygdarpolitikkur ... 15

**Trygd** ... 15
**Trygdarumboð** ... 15
**Sjónbandaeftirlit og trygdaravrit av teldukervi** ... 15
Umhvørvispolitikkur ... 16
**Umhvørvi** ... 16

# Okkara starvsfólkapolitikkur

Vit leggja dent á, at starvsfólkini skulu trívast á arbeiðsplássinum og skapa sær eina spennandi starvsleið í samtakinum. Hjá okkum fært tú:

- Fantastiskar starvsfelagar
- Gott samanhald
- Spennandi starvsmøguleikar í framtíðini
- Besta læruplássið í Føroyum

Vit hava øll, starvsfólk og leiðarar, eina felags ábyrgd at tryggja, at arbeiðsplássið framvegis verður eitt stað, har vit trívast og mennast. Hetta kemur okkum og gestunum til góðar.



## Tá vit møta til arbeiðis

Vit hava ábyrgd av gestunum, og tí er sera umráðandi, at vit sum starvsfólk eru umhugsin viðvíkjandi reinføri á hotellinum og eisini okkara egna persónliga reinføri.

- Starvsfólk skulu møta til arbeiðis væluppløgd og fyrikomandi
- Starvsfólk møta til arbeiðis í reinum, penum búna og skóm. Navnamerkið skal berast
- Prýðislutir, smyrsl og neglalakk skal vera neutralt, og skegg væl røktað
- Ávísar piercingar mugu ikki vera sjónligar fyri gestum í arbeiðstíð. Loyvt er at hava piercingar í oyrunum, og oyralokkurin skal í mesta lagi hanga 1 cm frá oyranum
- Starvsfólk, sum arbeiða við mati og hava langt hár, skulu seta hárið upp. Starvast tú í køkinum ella sum tænari á einum av matstovunum, skal hædd takast fyri ringum, oyralokkum og neglalakki, tí hesi kunnu savna bakteriur. Køksleiðarin og/ella matstovuleiðarin greiðir nærri frá um reinføri viðvíkjandi mati og prýðislutum

### Gestablídni og tænasta

Okkara endamál er at skapa eina góða uppliving fyri gestirnar, at vísa blíðskap og tryggja, at gestirnir minnast okkum og viðmæla okkum til onnur.

Hetta skulu vit øll hava í huga fyri at fáa gestin at kenna seg væl hjá okkum:

- Skapa eygnakontakt
- Gev eitt smíl
- Sig góðan morgun/dag/kvøld
- Ger okkurt eyka fyri gestin
- Bjóða loysnir ella aðrar møguleikar heldur enn at siga '*nei*' ella '*eg veit ikki'*
- Hav jaligt kropsmál, statt upprætt/ur, ikki falda armarnar, men hav eitt opið og innbjóðandi kropsmál
- Ver kunnaður um tað, sum hotellið hevur at bjóða, t.d. matskrá, upplatingartíðir, drekkivørur o.s.fr.
- Tá vit taka telefonina, móttaka vit altíð øllum eins:
    - *"Hotel Hafnia [køkurin] góðan dag/gott kvøld, hetta er [navn]"*
        - Royn og tosa á tí máli, sum gesturin tosar (hygg eftir landakotuni)
- Tá kundar klaga, minst til at lurta og gev tekin um, at tú skilir kundan. Ikki bróta av
    - Vís áhuga
    - Takka fyri at viðkomandi greiður frá tí, sum vit kunnu bøta um
    - Sig leiðaranum frá
    - Handfar støðuna beinanvegin og "bjarga" støðuni á staðnum

Sum tænari kanst tú koma út fyri t.d. hesu støðu: **<u>Bíðitíðin er ov long eftir at fáa matin</u>**

- Kanna í køkinum, hvussu gongur við at fáa matin kláran og bjóða gestunum eitt glas av víni ókeypis
- Sig gestinum frá, nær maturin verður borðreiddur

Tú kanst bjarga støðuni beinanvegin, um tú bjóðar gestunum kaffi, eitt glas av víni ella omaná "on the house", og vísir honum, at tú tekur ábyrgd og kunnar hann so við og við. Uttan mun til, um tú arbeiðir í móttøkuni, við reingerð ella í køkinum, so vilja vit, at hetta er mátin, vit møta gestunum hjá okkum.

Við at gera okkurt eyka fyri gestin, bjóða loysnir og møguleikar heldur enn at siga "*nei*" ella "*eg veit ikki*", og møta gestunum á ein jaligan hátt, kunnu vit fáa gestin at venda aftur til okkum næstu ferð.

## Sosialir miðlar og umdømið hjá hotellum okkara

Sum starvsfólk á Hotel Hafnia umtala vit okkara arbeiðspláss og starvsfelagar við virðing á sosialu miðlunum og annars í gerandisdegnum. Ring umtala skapar eina keðiliga mynd fyri okkara gestir og framtíðar starvsfelagar. Um tú hevur eina klagu, vend tær so til tín leiðara.

Seta fjølmiðlar seg í samband við teg, verður tú biðin um at vísa víðari til hotellleiðaran.

## Sjúkuleiðreglar

Um tú kvøldið áðrenn eina vakt følir teg illa og ivast í, um tú kanst koma til arbeiðis, royn tá at finna onkran at taka tína vakt. Tá ið tú hevur funnið ein at taka vaktina fyri teg, boða so tínum leiðara frá hesum. Eydnast tað ikki at finna onkran, ring so og boða leiðaranum frá hesum.

Tú skalt ringja til leiðaran og boða frá sjúku. Eini sms-boð ella boð á Messenger er ikki nóg mikið, tí at tað er ikki vist, at leiðarin sær boðini beinanvegin.

Um tú ikki fært fatur á leiðaranum, skalt tú ringja til móttøkuna og boða frá.

Verður tú sjúkrameldað/ur í meir enn 3 dagar, skal sjúkravátttan latast leiðaranum. Hotel Hafnia rindar fyri sjúkraváttanina.

Við longrivarandi sjúku kanst tú vænta, at leiðarin setur seg í samband við teg fyri at hoyra, um tað er okkurt leiðarin kann gera og fyri at vita, nær tú væntar at koma aftur. Um tað er neyðugt at tínar arbeiðsuppgávur skulu broytast, skalt tú siga leiðaranum ella HR-deildini frá.

Tímalønt og næmingar hava ikki rætt til løn í sjúkutíðarskeiðnum, men kunnu søkja um lønarendurgjald fyri mista inntøku á www.av.fo.

## Vaktarskipan og umbýting av vakt

Tú møtir upp til ásettu tíðirnar á vaktarskipanini og skalt vera klár/ur at byrja til ásettu tíðina.

Umbýting av vakt kann gerast á Planday, og tá er tað leiðarin, ið váttar, um umbýtingin ber til ella ei.

# Setanarviðurskifti

## Áðrenn tú byrjar í starvi hjá okkum

Áðrenn fyrsta starvsdag fær tú útflyggjað eitt skjal, ið eitur "***STAFF INFO***", ið tú skalt útfylla og senda tínum nærmasta leiðara skjótast gjørligt.

Á tínum fyrsta arbeiðsdegi verður tú móttikin av einum starvsfelaga, sum syrgir fyri, at tú fært eina góða byrjan.

## Búnar

Tað er sera týdningarmikið, at tú fært tann rætta búnan útflýggjaðan, áðrenn fyrsta starvsdag.




## Tænarar:

**<u>Hotel Hafnia:</u>** Tú fært ein búna, sum tú sleppur at eiga og brúka frítt. Tú betalir fyri helvtina av búnanum, og hetta verður tikið av lønini.

- Kvinnur: Skjúrta, niðurdeilur, buksur
- Menn: Klædningsbuksur, hvít skjúrta og slips

Tú verður biðin um sjálv/ur at møta til arbeiðis í penum svørtum skóm við svørtum botni og svørtum hosum/nylonsokkum, sum tú sjálv/ur skalt keypa.

**<u>Kafé Kaspar:</u>** Tú fært eitt fyriklæði frá Kaspar hvønn dag, og Hafnia vaskar tað fyri teg.
Tú skalt sjálv/ur syrgja fyri svartari blusu og svørtum buksum/niðurdeili innanfyri fyriklæðið. Harafturat svørtum skóm við svørtum botni og svørtum sokkum/svørtum nylonsokkum, sum tú sjálv/ur skalt keypa. Blusan skal ikki vera niðurringað ella hava opnan rygg.

**<u>Katrina Christiansen:</u>** Tú fært eitt fyriklæði frá Katrinu hvønn dag, og Hafnia vaskar tað fyri teg.
Tú skalt sjálv/ur syrgja fyri svartari skjúrtu og svørtum buksum/niðurdeili innanfyri fyriklæðið. Harafturat svørtum skóm við svørtum botni og svørtum hosum/nylonsokkum, sum tú sjálv/ur skalt keypa. Blusan skal ikki vera niðurringað ella hava opnan rygg.

## Móttøkufólk:

Tú fært ein búna, sum tú sleppur at eiga og brúka frítt. Tú betalir fyri helvtina av búnanum, og hetta verður tikið av lønini. Búnin er:

- Kvinnur: Skjúrta, niðurdeilur, buksur, jakki og kjóli
- Menn: Klædningur, hvít skjúrta og slips

Tú verður biðin um sjálv/ur at møta til arbeiðis í penum svørtum skóm við svørtum botni og svørtum sokkum/svørtum nylonsokkum, sum tú sjálv/ur skalt keypa.



Kokkar: Fáa klæðir frá Hafnia hvønn dag. Tú móttekur og letur skitin klæðir inn (eftir arbeiðstíð) á vaskarínum á Hotel Hafnia. Hafnia vaskar klæðini fyri kokkarnar. Tú skalt tú sjálv/ur syrgja fyri t-shirt og trygdarskóm, og tú kanst taka tínar egnu knívar við.

Gongsfólk: Fáa fyriklæði frá Hafnia hvønn dag, og Hafnia vaskar tað fyri teg. Tú skalt sjálv/ur syrgja fyri svartari blusu og svørtum buksum innanfyri fyriklæðið, og tú skalt vera í svørtum skóm.

## Prísir á búna við avsláttri:

| | |
|---|---|
| **Skjúrta Kvinnur 100 kr** | **Skjúrta Menn 135 kr** |
| **Buksur kvinnur 250 kr** | **Buksur Menn 250 kr (tvey sløg)** |
| **Jakki kvinnur 475 kr** | **Jakki menn 550 kr** |
| **Niðurdeilur 240 kr** | |
| **Kjóli 375 kr** | |
| **Vestur kvinnur 240 kr** | |

*Viðmerkjast skal, at Hotel Hafnia hevur seravtalu við Kemilux – øll starvsfólk fáa 10 % í avsláttri, tá ið tey keypa á Kemilux. Spyr tín nærmasta leiðara, um tú hevur spurningar hesum viðvíkjandi.*

### Løn, eftirløn og setanartreytir

Setanartreytir og løn eru sambært galdandi felags sáttmála á økinum.

Sum starvsfólk á Hotel Hafnia ert tú sett/ur eftir Gistingarhússáttmálanum.

Løn verður útgoldin seinast í hvørjum mánaða. Arbeiðsgevarin flytir eftirlønina, samstundis sum lønarflytingin verður gjørd.

Meira kann lesast um sáttmálar á heimasíðuni hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag [www.industry.fo](http://www.industry.fo)

Hevur tú spurningar hesum viðvíkjandi, kanst tú venda tær til tín nærmasta leiðara ella HR-deildina.

## Trygging

Sum starvsfólk hjá okkum ert tú tryggjað/ur móti arbeiðskaðum.

Summi fakfeløg hava eina lívstrygging. Tað merkir, at ein ávísur partur av limagjaldinum fer til eina lívs- og vanlukkutrygging. Lesast kann nærri um hetta á heimasíðunum hjá fakfeløgunum.

## Planday

Tú stemplar teg inn/heim frá arbeiði á Planday. Á Planday sært tú vaktarskipanina, hvussu nógvar tímar tú hevur arbeitt, boð frá leiðaranum, tínar starvsfelagar, umbýting av vakt, ynskir um feriu v.m.

Stemplast skal, tá møtt verður til arbeiðis, og somuleiðis, tá liðugt er at arbeiða. Fyri ein arbeiðsdag verður ein hálvur tími trektur frá fyri mattíð á middegi.

Tá privat ørindi verða gjørd, t.d. læknaørindir og annað, skal stemplast út . Stemplað verður inn aftur, tá komið verður aftur til arbeiðis.

Starvast tú á meira enn einari deild, minst so til at skráseta teg á røttu deildini.

## Matarsteðgur

Øll starvsfólk hava rætt til ein hálvan tíma matarsteðg fyri hvørjar átta arbeiðstímar. Matarsteðgurin er uttan løn.

Starvsfólkamatur er at fáa í hesum tíðarskeiðum:

- 10:15 – 10:30 Avlop frá morgunmatarborðinum
- 14:15 – 14:45 Mánadag til fríggjadag – eftir frokostbuffét
- 17:00 – 18:00 Starvsfólkamatur, ið køkurin tilreiðir

Sum starvsfólk hevur tú ábyrgd av at skiftast við tínar starvsfelagar um at hava steðg, soleiðis at tað altíð eru starvsfólk tøk til at veita gestunum eina góða tænastu.

## Feria

Tú hevur rætt til feriu sambært galdandi kollektiva sáttmála og frítíðarlóg. Frítíðarárið er frá 01.05 – 30.04 og tú hevur rætt til 5 vikurs feriu.

Í samráð við tín leiðara velur tú, hvussu tú ynskir at leggja tína frítíð.

- 1 feriuvika er 5 dagar (mánadag – fríggjadag). Tú kanst tilsamans spara 25 dagar upp í einum ári
- Tú biður um ynskta feriu á Planday. Leiðarin skal vátta umbønina.

## Feria við løn, fastlønt

Fyrsta árið í starvi er ferian ikki við løn. Tú sparir tær 2,08 dagar saman pr. mánaða í feriu við løn, sum kann brúkast næsta árið í starvi. Fyrsta árið í starvi kanst tú tó sjálv/ur gjalda fyri feriu. Práta nærri við tín leiðara um hetta.

Harumframt fært tú útgoldið serligt frítíðaríkoyti á 1,5 % fyrst í mai.

## Feria uttan løn, tímalønt

Sum tímalønt fært tú ikki løn í feriuni. Í staðin fyri fært tú útgoldið frítíðarpening, sum er 12% av lønini. Frítíðarpeningurin verður útgoldin fyrst í mai.

## Heima hjá sjúkum barni

Loyvt er at vera heima hjá sjúkum barni/børnum tveir teir fyrstu sjúkradagarnar, um børnini eru yngri enn 14 ár, tó í mesta lagi 10 dagar um árið. Er talan um serliga støðu, verður tú biðin um at seta teg í samband við tín leiðara.

Tímalønt hava ikki rætt til løn í sjúkutíðarskeiðnum, men tú kanst søkja um lønarendurgjald fyri mista inntøku barnsins 1. og 2. sjúkradag á www.av.fo.

## Barnsburðarfarloyvi

Tú hevur rætt til barnsburðarfarloyvispening frá Barsilsskipanini. Tú søkir við at fylla ein frymil út á www.barsil.fo. Umsóknarfreistin er 1 ár eftir, at barnið er føtt. Umsóknir verða tó viðgjørdar, tá ið farloyvið byrjar, so best er at senda umsóknina sum skjótast. Á heimasíðuni www.barsil.fo fæst meira at vita um barnsburðarfarloyvi, og hvussu tú søkir.

Tú ert vælkomin at seta teg í samband við leiðaran ella HR-deildina fyri nærri kunning.

## Tá tú fert úr starvi

Leysafæ so sum lyklar, navnaspjaldur og "staff card", ið tú hevur móttikið frá hotellinum, eru okkara ogn, og skulu latast inn aftur.

## Uppsøgn

Um starvsfólk í føstum starvi ynskja at siga seg úr starvi, er uppsagnarfreistin leypandi mánaði + ein mánaður.

Um tímalønt starvsfólk, sum arbeiða minni enn hálva tíð, ynskja at siga seg úr starvi, ynskja vit at uppsagnarfreistin er 14 dagar. Tó er góður siður at boða frá uppsøgn ein mánaða frammanundan.

Í royndartíðini, sum er teir fyrstu 3 mánaðirnar, er hendan freistin ikki galdandi.

# Innanhýsis politikkur

## Merkisdagar

Vit hátíðarhalda útlærdar lærlingar, 10 ára, 25 ára og 40 ára starvsdag, og tá fólk fara frá við pensjón.

## Starvsfólkaavsláttur og STAFF CARD

Fyri at fáa STAFF CARD skalt tú vera í føstum starvi og/ella starvast meira enn 30 tímar um vikuna. Vend tær til tín leiðara fyri at fáa títt nýggja STAFF CARD.



## Teldur/Alnót

Brúkaranavn og loyniorð til internetið fæst í móttøkuni. Teldurnar á hotellinum skulu bert nýtast til arbeiðsbrúk.

Vit hjálpa sjálvsagt gestum, um teir ynskja at printa út skjøl ella líknandi.

## Gloymdir lutir

Kemur tú fram á gloymdan lut, verður tú vinarliga biðin um at lata móttøkuni hendan og upplýsa, hvar tú fanst lutin.

## Privatar fartelefonir

Har privata fartelefonin ikki er ein partur av tínum arbeiði, skal telefonin verða ljóðleys í arbeiðstíðini. Tú ert vælkomin til at nýta telefonina í steðgunum, men ikki í arbeiðstíðini.

## Royking og rúsevni

Tað er bert loyvt at roykja í tínum høvuðssteðgum – við síðuna av skrellirúminum móti Havnar Kirkju. Tað er ikki loyvt at møta ávirkaður til arbeiðis ella drekka í arbeiðstíð. Brot á rúsevnispolitikkin kann viðføra uppsøgn ella burturvísing.

Um starvsfólk hevur trupulleikar av alkoholi ella øðrum rúsandi evnum, ynskja vit á Hafnia heldur at hjálpa enn at straffa. Vinarliga boða nærmasta leiðara frá.

## Happing

Rúm skal vera fyri okkum øllum, og tí verður happing ikki góðtikin. Standast trupulleikar av happing er tað eitt starvsfólkamál, sum hotellið tekur í fullum álvara.

## Tagnarskylda

Sum starvsfólk hava vit øll tagnarskyldu um tað, sum hendir á hotellunum viðvíkjandi okkara gestum og starvsfólki.

- Kamarsnummar og navn á gesti verður ongantíð upplýst óviðkomandi
- Privatur bústaður og tlf. nr. hjá starvsfólki verður ongantíð upplýst óviðkomandi

Tagnarskyldan er eisini galdandi, tá ið tú ert farin úr starvi.

# Trygdarpolitikkur

## Trygd

Vit hava ábyrgd av trygdini hjá nógvum fólki, og tí er tað eitt krav, at øll starvsfólk seta seg inn í trygdarviðurskiftini. Kunna teg tí um:

- Hvar trygdarútgerðin er
- Hvussu trygdarútgerðin verður nýtt
- Hvar neyðdyr- og trappur eru

Húsavørðurin tekur teg við á eina trygdarrundferð, har víst verður, hvar neyðdyr, neyðtrappur og trygdaramboðini eru, og hvussu tey verða nýtt. Tú fært somuleiðis eitt trygdarkort, ið vísur, hvat tú skal gera, um t.d. eldur kemur í. Harumframt verða ymisk trygdarskeið boðin út.

Øll kømur á hotellinum eru útgjørd við brandalarmum. Eitt yvirlit av hotellinum er inni á hvørjum kamari, har gesturin kann lesa, hvar neyðdyr og rýmingarvegir eru. Brandútgerðin verður kannað árliga.

## Trygdarumboð

Á Hotel Hafnia er ein fimmmanna trygdarnevnd. Høvuðsleiðarin í trygdarnevndini er hotelstjórin, og harafturat eru tveir arbeiðsleiðarar og tvey trygdarumborð vegna starvsfólkini. Tú ert altíð vælkomin at venda tær til trygdarumboðini við spurningum viðvíkjandi trygdini.

## Sjónbandaeftirlit og trygdaravrit av teldukervi

Fyri trygdina á Hotel Hafnia, bæði fyri starvsfólk og gestir, eru upptøkutól sett upp við allar atkomuvegir til hotellið, í móttøkuni og á Kafé Kaspar. Um tað skuldi komið fyri, at herverk, stuldur ella annað er á hotellinum, verða sjónbondini kannaði.

Av trygdaráðum verður somuleiðis hvørja nátt tikið trygdaravrit av øllum hendingum, sum eru farnar fram á teldukervinum.

# Umhvørvispolitikkur

## Umhvørvi

Vit ynskja at ansa eftir umhvørvinum og hava m.a. tikið stig til hesi átøk:

- Hotel Hafnia og Hotel Brandan hava altjóða Green Key (ecolabel) prógv
- Reingerðarevni og útgerð eru umhvørvisvinarlig
- 30% av øllum drekkivørðum eru vistfrøðilig, m.a. alt kaffi, húsvín og vanlig bjór
- Gistir gesturin í meira enn eina nátt verða handkløðini skift, tá ið gesturin ynskir tað
- Pappkoppar eru úr endurnýtslupappíri
- Spariperur verða nýttar, har ið møguleiki er fyri tí
- Øll gólvteppi á Hotel Hafnia eru gjørd úr endurnýtsluplasti
- Súgvirør á Katrinu Christiansen eru gjørd úr kopari
- Avmarkað nýtsla av plastgløsum, og tey, vit nýta, eru biodynamisk
- Battaríir verða samlaði inn í móttøkuni og beind burtur á rættan hátt
- Fløskur verða seldar til endurnýtslu, og papp verður samlað og pressað í skrellirúminum til endurnýtslu
- Og nógv onnur tiltøk
- Hevur tú hugskot til umhvørvistiltøk ella spurningar, vinaliga vend tær til leiðaran ella skriva til green@hafnia.fo

Vónandi hevur tú fingið eitt sindur av hjálp til, hvussu tú fyrireikar teg til tín fyrsta starvsdag hjá okkum - og nýt endiliga handbókina sum uppslagsverk í gerandisdegnum.

Vit eru fegin um, at tú byrjar í starvi hjá okkum. Enn einaferð vælkomin á Hotel Hafnia
og góðan arbeiðshug!